**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Fiskiroyndir. Túrur nr. 1212.**
**Tíðarskeið: 11/4-18/4 – 2012.**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen

Ábyrgd: Erling í Liða.

**Endamál:** Høvuðsendamálið var at kanna nøgd, longd, vekt og samanbera trolveiðu á heilt ella lutvíst trolfriðaðum leiðum uttan fyri 12 fj. markið við trolveiðu á vanligum trolleiðum.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol 470 við 135 mm posa, Rockhopper-grunnur, breitlar 60 m og Vágs-hurðar.

**Um túrin:**
Vit fóru av Havnini hóskvøldið 12/4, kl 21.00, byrjaðu í kassa H vestur úr Mykinesi, fóru síðan í kassa I norð-vestur úr Mýlingi, og síðan í kassa D norðuri á Fuglfjarðaoyðuni.

Vóru aftur á Havnini 17/4-2012 kl 16:00, har veiðan varð løgd upp.

Tilsamans vórðu 16 tóv, sýni varð tikið av 14 tóvum.

Gott veður allar dagarnar.

**Merktir toskar:** Vit fingu tveir merktar toskar á túrinum, báðir vóru í fyrsta tóvinum í kassa H, vestur úr Mykinesi.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini.

Mourits Mohr Joensen